UTTAN ÚR HEIMI

## Bush fer kanska til Miðeysturs

George W. Bush, forseti, umhugsar nú, um hann sjálvur skal royna at fáa ferð á friðartilgongdina í Miðeystri.

Mikudagin tosaði Bush í telefonini við ísraelska forsætisráðharran, Ariel Sharon, og panslestinska forsætisráðharran, Mahmoud Abbas. Í næsta mánað skal Bush til Evropa at ferðast, og blaðið New York Times vil vera við, at forsetin umhugsar at leingja ferðina, so hann eisini kann fara til Miðeysturs. Tað tykist greitt, at Bush fer ikki til Ísraels, tí viðurskiftini har verða ikki hildin at vera nóg trygg, og tí verða Kuwait og Qatar nevnd sum møguligir fundarstaðir.

Palestinararnir hava góðkent tað seinasta friðaruppskotið, men tað hevur Ísrael ikki gjørt. Tað ger ikki viðurskiftini millum teir báðar partarnar betur, at Ísrael mikudagin noyddi Mahmoud Abbas at avlýsa eina ætlaða ferð til Gaza-geiran. Beint áðrenn Abbas skuldi fara hagar, sendi Ísrael fimtan stríðsvognar til Gaza og byrgdi eitt stórt øki av.

## Semja um rudding

Tíggju lond, teirra millum Russland, Noreg og Svøríki, skrivaði fyrradagin undir eina semju um at beina fyri ymsum kjarnorkuburturkasti á Kolanesinum.

Í fyrsta umfari snýr tað seg um gamlar kjarnorkuriknar russiskar kavbátar, sum liggja fyri akkeri á fleiri víkum á Kolanesinum, og í øðrum lagi er talan um nøkur skip, sum liggja í havnini í Murmansk fermd við kjarnorkuburturkasti. USA var við í samráðingunum, men vildi ikki skriva undir, tí landið er ikki nøgt við ásetingarnar um, hvør hevur ábyrgdina, um eitt óhapp hendir undir ruddingararbeiðinum. Amerikanarar hava kortini lovað at gjalda ein part av tí, sum arbeiðið fer at kosta.

Svenski uttanríkisráðharrin, Anna Lindh, sum hevur staðið á odda fyri samráðingunum, sigur, at ES hevur játtað umleið eina milliard krónur til ruddingararbeiðið og til at nútímansgera russisk kjarnorkuverk.

## Herferð á Mount Everest

Sjey menn í einum hernaðarligum rannsóknarliði, sum India og Nepal hava skipað í felag, komu í gjár niðan á toppin á heimsins hægsta fjalli, Mount Everest.

Teir sjey menninir høvdu sjey berarar við sær, og allir fjúrtan menninir komu í gjár oman aftur til eina støð, sum teir høvdu gjørt sær á veg niðan á fjallið. Teir indisku og nepalsku hermenninir fóru upp á suðursíðuni á fjallinum og gingu somu leið, sum Edmund Hillary og Tenzing Norgay nýttu, tá teir sum teir fyrstu komu upp á Mount Everest fyri 50 árum síðani.

Beint eftir at teir sjey hermenninir vóru komnir niðan á toppin, komu nakrir japanar og nakrir fransmenn eisini niðaná, og tveir tímar seinni eydnaðist tað eisini nøkrum kinverjum og nøkrum suðurkoreanarum at sleppa upp á Mount Everest.

## Danmark á 2. plássi

Eitt yvirlit yvir, hvussu nógv ymisk lond lata í menningarhjálp, vísir, at Danmark er á øðrum plássi.

Yvirlitið umfatar 21 lond, og tað er ein amerikanskur stovnur, sum hevur gjørt tað. Har sæst millum annað, at bara Niðurlond lata meiri í menningarhjálp enn Danmark. Hinvegin eru rík lond sum USA og Japan langt niðri í yvirlitinum.

ST hevur lagt eina ætlan um menningarhjálp tey næstu tólv árini, og Kofi Annan, aðalskrivari hevur sett ein stovn at halda eygað við, at tey einstøku londini halda tað, sum tey hava lovað. Danska uttanríkisráðið hevur sett sær fyri at gera uppaftur meiri við menningarhjálpina og samstarvar við fleiri ST-stovnar og sjálvbodnar felagsskapir fyri at røkka málinum.

# Alt skalv í fimm minuttir



*Bjargingarliðini funnu nógv lík undir teimum niðurrapaðu húsunum*

**Meiri enn 550 fólk doyðu, og næstan 5.000 finsu skaða í harða jarðskjálvtanum í Algeria.**

JARÐSKJÁLVTI
*Árni Joensen*

Jarðskjálvtin í Algeria fyrrakvøldið var ein av teimum hørðu og samstundis ein av teimum drúgvu. Úrslitið var eisini har eftir, meiri enn 550 deyð og næstan 5.000 løstað.

Amerikanskir jarðfrøðingar máldu skjálvtan til 6,7 stig á Richter-stiganum. Sjálvur miðdepilin var einar tíggju kilometrar undir jørð nærhendis býnum Thenia 70 kilometrar eystan fyri høvuðsstaðin Alger. Sjálvur høvuðsskjálvtin vardi nøkur sekund, men fleiri eftirskjálvtar gjørdu, at økið skalv í næstan fimm minuttir. Úr Spania verður sagt, at har merktu tey skjálvtan á suðurstrondini og á oyggjunum Mallorca og Ibiza.

Jarðskjálvtar eru ofta í Algeria. Í 1999 doyðu 22 fólk í einum skjálvta, og í 1994 kravdi ein jarðskjálvti 170 mannalív. Ta ferðina mistu 150.000 fólk hús og heim.

# Vandin fyri kjarnorkukríggi er vaksin

**Vandin fyri, at eitt mistak skal elva til kjarnorkukríggj millum USA og Russland, er vaksin seinastu árini, siga amerikanskir granskarar, sum vilja hava Bush og Putin at viðgera málið í næsta mánað.**

KJARNORKUVÁPN
*Árni Joensen*

Hóast meiri enn tíggju ár eru liðin, síðani Kalda Kríggið endaði, Sovjetsamveldið varð upployst, og USA og Russland fóru at samstarva, er vandin fyri einum kjarnorkukríggi millum teir báðar gomlu fíggindarnar minni enn so av.

Tað siga granskararnir á viðurkenda amerikanska RAND-stovninum. Teir mála eina sera dapra mynd av russisku kjarnorkumegini, og teir siga seg ivast í, at tey góðu viðurskiftini millum Russland og USA hava bøtt um trygdina, tá saman um kemur.

Niðurstøðan hjá RAND-stovninum samsvarar væl við tað, sum formaðurin í amerikanska felagsskapinum The Nuclear Threat Initiative, demokratiski senatorurin Sam Nunn, hevur víst á. Saman við republikanska senatorinum Richard Luger, sum er formaður í uttanríkispolitisku nevndini hjá senatinum, hevur Sam Nunn virkað fyri at skerja kjarnorkuvápnagoymslurnar og at forða fyri, at kjarnorkuvápn enda í hondunum á teimum, sum ikki eiga at hava atgongd til slík vápn.

- Eingin okkara heldur, at USA og Russland fara at byrja eitt kjarnorkukríggj við vilja. Men bert eitt lítið mistak ella eitt óhapp kann vera nóg mikið, og tann møguleikin er til staðar, sigur Sam Nunn.

Hann sigur, at vandin fyri at yvirgangsmenn skulu fáa fatur á kjarnorkuvápnum er í Russlandi og ikki í Irak ella Iran, og hann heldur ikki, at George W. Bush, forseti, hevur givið hesum nóg stóran ans. Undir valstríðnum segði Bush annars, at hann ætlaði sær at leggja dent á at tryggja kjarnorkuvápn kring heimin, men tað hevur hann ikki gjørt enn, sigur senatorurin.

Granskararnir hjá RAND-stovninum vísa á, at USA og Russland hava nóg mikið av kjarnorkuvápnum til at leggja allan heimin í oyði eftir einum tíma, og at tað tekur bert nakrar minuttir at trýsta á allar teir neyðugu knøttarnar. Teir siga eisini, at búskaparligu trupulleikarnir í Russlandi hava gjørt, at kjarnorkuvápnini hava fingið størri týdning fyri russar enn onnur herútgerð. Men russiska útgerðin er yvirhøvur í ringum standi, og skal Russland hava ein møguleika í einum kjarnorkukríggi ímóti USA, hava teir bert eitt at gera, og tað er at trýsta á knøttarnar, áðrenn amerikanararnir gera tað, og hetta er ein vandamikil støða, stendur í frágreiðingini hjá RAND-stovninum.




# Bygdasøvnini í Føroyum í summar

**Nólsoyar Bygdarsavn**
**Húsini við Brunn**
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 327020 ella 327036. Atgongugjald: 20,- kr.

**Sørvágs Bygdarsavn**
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 332893, 333284 ella 333191. Atgongugjald: 30,-

**Miðvágs Bygdasavn**
**Kálvalíðhúsini**
Savnið er opið eftir avtalu við Vága Kunningarstovu, tlf. 333455 ella 212705. Atgongugjald: 20,- kr.

**Tvøroyrar bygda- og sjóvinnusavn**
**Gamla Doktarahúsið**
Frá 25. mai til 31. august er savnið opið hvønn sunnudag kl. 15.00-18.00. Annars eftir avtalu á Kunningarstovuni á Tvøroyri, tlf. 372480 ella 254941. Atgongugjald: 20,- kr.

**Sands Bygdarsavn**
**Norðara Koyta**
Frá 1. juni til 31. august er savnið opið hvønn sunnudag kl. 16.00-18.00. Annars eftir avtalu við Sandoyar Kunningarstovu, tlf. 361836 ella 222078. Atgongugjald: 20,- kr.

**Vestmanna Bygdarsavn**
Savnið í kommunubygninginum er opið mánadag til fríggjadag kl. 10-12. Annars eftir avtalu á tlf. 424218 ella 424103. Ókeypis atgongd.

**Eiðis Bygdasavn**
**Látrarroykstovan**
Frá 1. juni til 31. juli er savnið opið mikudag og sunnudag kl. 14-16. Atgongugjald: 20,- kr. Bólkar, min. 10, eftir avtalu á tlf. 423597, 423269 ella 423102.

**Bygdasavnið í Nes kommunu**
**Gamli Prestagarðurin**
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 447438 ella 447251. Atgongugjald: 20,- kr.

**Bygdasavnið Forni**
**Glyvrar**
Frá 1. juni til 15. september er savnið opið mánadag, mikudag og sunnudag kl. 16-19. Annars eftir avtalu á tlf. 226088, 447391 ella 449214. Atgongugjald: 30,- kr. Bólkar, min. 10, 20,- kr. fyri hvønn.

**Gøtu Fornminnissavn**
**Blásastova við hoyggjhúsinum og Glyvra Hanusar hús**
Frá 19. mai til 15. september er savnið opið mánadag, týsdag, fríggjadag, leygardag og sunnudag kl. 14-16. Annars eftir avtalu á tlf. 222717 ella 228768. Atgongugjald: Vaksin 30,- kr. børn 10,- kr.

**Norðoya Fornminnasavn**
**Handilshúsini, Gamla Apotekið, Klaksvík**
Frá 15. mai til 15. september er savnið opið hvønn dag kl. 13-16. Annars eftir avtalu á tlf. 456287 ella 456939. Atgongugjald 20,- kr. Bólkar, min. 10, 15,- kr. fyri hvønn



Vive la Difference…
Kvinnur sum leiðarar

Í samstarvi við Pernille Aalund og Joan Peitersen, skipar Føroya Tele fyri ráðstevnu, **fríggjadagin 13. juni** í hølunum hjá Leikhúsinum Gríma í Tórsgøtu.

Vit seta fokus á leiklutin hjá kvinnum í leiðsluhøpi. Tær báðar, Pernille Aalund og Joan Peitersen hugleiða um tað er rætt, at kvinnur ikki tora at halda seg til. Um hvussu kvinnur við succes fáa familjulív og arbeiðslív at hanga saman. Um hvussu kvinnur eydnast sum leiðarar og um hvør munurin er á kvinnuligum og mannligum leiðarum.

Úr Danmark koma:
- **Pernille Aalund**, rithøvundur, sjónvarpsvertur og stjóri á www.oestrogen.dk
- **Joan Peitersen**, ráðgevi og partnari hjá PS4

Úr Føroyum:
- **Turið Debes Hentze**, advokatur
- **Marita Rasmussen**, fiskivinnufrøðingur
- **Laufey H. Blaasvær**, akademiøkonomur
- **Sólja í Ólavstovu**, Løgfrøðingur og aðalstjóri
- **Andras Róin**, stjóri á Føroya Tele

Frásøgufólk: Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna

Kostnaður kr. 549,00 + mvg. íroknað ábit, kaffi og morgunmat. Ráðstevnan byrjar kl. 8.30 og endar 17.00.
Avmarkað pláss á luttakarum. Tilmeldingarfreistin er 6. juni 2003.
Kunning og tilmelding fer fram á www.olivant.fo/radstevna, ella á tel 303040.

www.olivant.fo/radstevna.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni.

www.torshavn.fo

# Ólavsøkan 2003

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til fríggjadagin 20. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 20. juni 2003 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.



**Fiskimálaráðið**
*Skipaeftirlitið*

# Lýsing frá Sjóvinnufyrisitingini

Sjóvinnufyrisitingin er frá 1. mai 2003 løgd saman við Skipaeftirlitinum. Øll skrivstovu avgreiðsla og alt samskifti viðv. sjóvinnubrøvum, manningarskjølum, undantaksloyvum og øðrum viðurskiftum Sjóvinnufyrisitingin tekur sær av, verður framyvir avgreitt á Skipaeftirlitinum í Miðvági.

Adressa:
Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin
Postsmoga 26
370 Miðvágur

Tlf. 35 56 00 · Fax 35 56 01
Teldupostur: fma@fma.fo

Ynskja tygum nærri upplýsingar, kunnu tygum ringja á tlf. 35 56 00 ella 35 30 30 og spyrja eftir Johild Ziskason, fulltrúa.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 1648, P/F Eystaravág, 480 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Marni Olsen, Krosslíð 5, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Gunnar Mohr, J. C. Svabosgøta 29, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 21. mai 2003*
*Kristin Balle*


COMPAQ Local Service Partner
Video kanónir
Digital fototól
Scannarar
Printarar
Tónarar og patrónir
Kopipappír
hp invent
www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840


www.sosialurin.fo